Oyggjablaðið





VÁTT UPPLIVILSI

*Tað ráddi um at brúka løtuna, tá børnini í dagstovninum í Hvalvík høvdu navngivið flaka teirra "Dragan". Bæði børn og vaksin hugnaðu sær beinanvegin við nýggja flakanum í ánni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




# »Dragan« skal navn títt verða

**HVALVÍK Tað skuldi ganga rættiligt og ordiligt fyri seg, tá børnini í barnagarðinum við Kráir skuldu navngeva flaka teirra.**

Mikudagin 2. juni var dagurin, tá navngevingin skuldi fara fram.

Ikki tí, - tá tey fyrrapartin hugdu út gjøgnum gluggan, var einki sum bendi á at henda stórhendingin hjá børnunum fór at gerast veruleiki.

Regnið oysti niður hesa løtuna, og tað var ikki frítt, at starvsfólkini byrjaðu at umhugsa, um ein ikki skuldi útseta navngevingina til fríggjadagin.

Men so vístu veðurgudarnir seg frá síni bestu síðu: Sohvørt tað fór at nærkast middegi, sleit hann í. Og mín sann, um ikki sólin dagaði undan. Seinnapart á degi var tann stóra løtan komin. Í skrúðgongu og við fløggum í hond fór tann stóri barnaflokkurin úr dagstovninum og oman til áarbakkan, har navnleysi flakin lá.

Til høvið varð gjørd ein serstøk »champagnu-fløska« sum varð pakkað inn í silvurpappír. Og børnini høvdu enntá ómakað sær at skriva ein sang til endamálið. Einki lag var til sangin, so at hann varð bara rappaður ístaðin.

Soleiðis bar tað til, at flakin hjá dagstovninum fekk navnið »Dragan«. Og sum myndin vísir, varð hann tikin í nýtslu beinanvegin.

snorri@sosialurin.fo

# Rógva kapp móti vinarkommunu

**Sunda kommuna fær vitjan av vinarkommunu úr Noreg á Sundalagsstevnuni. Á skránni er millum annað vitjanir á stovnum og fyritøkum í kommununi. Men so ætlar Sunda kommuna eisini at hevna eitt tap frá tí, at Sunda kommuna vitjaði í Noreg í fjør**

Rólant Waag Dam

Á Sundalagsstevnu fær Sunda kommuna vitjan av Rissa kommune úr Noreg. Rissa liggur á Fosenhálvoynni og er grannakommuna til Tróndheim, har Tróndheimfjørðurin er sjálvt kommunumarkið.

Eins og við Sunda kommunu, so er Rissa kommune ein samanrenning av fleiri kommunum. Í teirra føri er talan um tríggjar kommunur, sum løgdu saman í 1963.

– So tey hava nakrar royndir, sum vit kunnu læra av og taka til okkum, sigur Kim Durhuus, borgarstjóri í Sunda kommunu um samstarvið við Rissa kommune, sum fevnir um 623 ferkilometrar og telur stívliga 6000 fólk.

### Róðu kapp í Noreg

Í fjør vóru umboð fyri Sunda kommunu og vitjaðu í Rissa kommune. Hetta var gjørt í samband við nakrar marknaðardagar, har politisku flokkarnir høvdu básar á gonguøtuni, traktorar vórðu sýndir fram og eitt slag av kapprógving var á skránni, umframt nógv annað.

– Kapprógvingin var í heilt gomlum norskum bátum og als ikki soleiðis, sum vit kenna kapprógving her heima. Vit høvdu tvær árar í part og ongan róðursmann. Nú hugsa vit at gera nakað tað sama, sum tey gjørdu við okkum og sleppa tey í ein bát og so kapprógva, greiðir Kim Durhuus frá.





Hann dylir ikki fyri, at hann vónar at fáa hevnd, tí sum skilst gekk rógvingin í Noreg ikki serliga væl.

– Ja, tú kanst gott siga, at vit vilja hava hevnd nú, flennir Kim Durhuus.

### Vitja stovnar og fyritøkur

Rissa kommune skal tó annað enn kapprógva í Hvalvík á Sundalagsstevnuni.

– Tey koma fríggjakvøldið. Ætlanin er at vitja skúlar og barnagarðar. Eisini fara vit framvið á Mørkini, og so hava vit eisini ymiskt á skránni í Tjørnuvík, fortelur Kim Durhuus, borgarstjóri í Sunda kommunu.

Sum skilst, so vera tað eisini átta ella níggju fólk, sum koma úr Noreg fríggjadagin og hesi steðga til týsmorgunin, tá tey fara heimaftur.

rolant@sosialurin.fo